umhvørvisstovan

ADVOKATUR KRISTINA SAMUELSEN
LÍTLATRØÐ 3
100 TÓRSHAVN

Argir hin 11. apríl 2016
Málsnr.: 15/00177-11
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Suni Petersen

**Loyvi at taða oman fyri 250 metra hædd**

Umhvørvisstovan veitir við hesum, sambært § 8, stk. 5 í kunngerð nr. 87 frá 29. mai 2012 um taðing, Jóannes Debes, Oyrareingir tíðaravmarkað undantaksloyvi í trý ár at taða eitt øki í uml. 300 – 370 metra hædd á matr. nr. 257a í Kollafirði (við Hundsarabotn).

Undantaksloyvið er fyribils tíðaravmarkað til 31. august 2018.

## 1. Umsókn

Kristina Samuelsen, advokatur hevur, vegna Jóannes Debes á Oyrareingjum, søkt um undantaksloyvi at taða á einum avmarkaðum øki í haganum upp á uml. 400.000 m$^2$ í uml. 300 – 370 metra hædd á matr. nr. 257a í Kollafirði. Hann hevur fyri nøkrum árum síðani, í fleiri ár, taðað á økinum.

Í umsóknini verður m.a. sagt, at bóndin hevur eina taðingarætlan, sum kommunan hevur góðkent, men at bóndin í tíðarskeiðum áðrenn bøurin er sligin, ikki hevur møguleika at koyra tøðini á bøin. Hesi tíðarskeið er tørvur á at gagnnýta tøðini í haganum. Ikki ber til at brúka tøðini á økjum hjá øðrum bóndum nærhendis, vegna ridluskriða.

## 2. Málsviðgerð

Økið, har søkt er um at taða, er í uml. 300 – 370 metra hædd, har forboð er fyri at taða sambært § 8, stk. 4 í kunngerðini um taðing.

Endamálið við kunngerðini um taðing er m.a. at fremja nýtsluna av tøðum sum tilfeingi, og samstundis at tryggja, at taðing ikki elvir til dálking av umhvørvinum ella ampar í nærumhvørvinum. Fyri at verja natúrliga gróðurin í haganum er forboð fyri at taða oman fyri 250 metra hædd, men kann Umhvørvisstovan í serligum førum veita undantaksloyvi.

Í sambandi við viðgerð av málinum hevur Umhvørvisstovan verið á staðnum saman við umsøkjaranum og umrøtt málið og hugt at økinum.

Umhvørvisstovan metir, at tað er umráðandi, at tøðini verða gagnnýtt sum tilfeingi. Tað, at ridluskriði er á økinum, sum hoyrir til festið, ger, at ikki ber til at nýta tøðini aðrastaðni.

Samstundis metir Umhvørvisstovan, at taðing oman fyri 250 metra hædd skal avmarkast mest møguligt, men at ein skynsom taðing kann verða loyvd á avmarkaðum øki í haganum. Tað eigur ikki, ella í minst møguligan mun, at verða taðað á økjum, har áður ikki er taðað.

Umsóknin varð send til Náttúrugripasavnið, Búnaðarstovuna og Tórshavnar kommunu til ummælis.

Náttúrugripasavnið mælir frá at ganga umsóknini á møti við tað, at taðing er eitt inntriv í náttúruna, sum fer at broyta vistskipanina á økinum.

Búnaðarstovan mælir til at játta umsóknini, og heldur tað vera skilagott at brúka tøðini, har tey vera til nyttu fyri húsdjórini, ið hoyra til festið. Eisini vil taðingin forða fyri erosión, eins og skynsom taðing nørir um natúrliga vøksturin í haganum. Harafturat verður sagt, at tað vildi verði ábyrgdarleyst at spreitt tøðini á øðrum staði enn í haganum, sum hoyrir til festið, av tí at talan er um øki, sum er rakt av ridluskriða, og mugu øll atlit tí takast fyri ikki at spreiða sjúkuna til onnur støð.

Búnaðarstovan sigur, at taðing við organiskum tøðum er ein góður háttur at stimbra endurvalling. Nevnt verður, at tað í fyrsta umfari kann broyta plantusamansetingina, við at nøkur fremmand plantusløg kunnu spretta fram, men at hesi eftir stuttari tíð fána burtur, og heimligu sløgini taka yvir. Mælt verður til at geva tíðaravmarkað loyvi, og at tøð ikki verða sprænd í haganum sama stað á hvørjum ári, men kanska triðja hvørt ár. Mælt verður eisini til, at nøgdin av tøðum verður avmarkað til 200 kg av N pr. hektar um árið, sum svarar til uml. 50 $m^3$ av flottøðum pr. hektar um árið. Somuleiðis verður mælt til, at tað ikki verður taðað meiri hvørja ferð enn tað, ið samsvarar við 100 kg av N pr. hektar, t.v.s. at spræna uml. 25 $m^3$ tvær ferðir í gróðrartíðini, t.e. í seinnu helvt av mai og so aftur um ólavsøkumundið, við í minsta lagi átta vikum ímillum. Hetta fyri at tøðini verða gagnnýtt so væl sum gjørligt.

Heilsu- og umhvørvisdeildin hjá Tórshavnar kommunu viðmælir umsóknini, og vísir á, at taðað hevur verið á økinum í mong ár frammanundan, og at taðingin kann fyribyrgja erosión.

## 2.1 Hoyring

Uppskot til loyvi varð sent umsøkjaranum til ummælis.

Kristina Samuelsen, advokatur, hevur vegna umsøkjaran hesar viðmerkingar:

Mælt verður til, at loyvt verður at taða á øllum økinum, sum søkt er um, yvir longri tíðarskeið, oftari og á hvørjum ári.
Umhvørvisstovan kann ganga við til, at loyva taðing á tí øki, sum søkt er um, uttan økinum við granskingarøkið hjá Søvnum landsins og á tveimum økjum nærhendis grótbrotinum, har Umhvørvisstovan metir, at torført er at taða, uttan at gera seg inn á forboðið fyri at spræna á hagagrót.

Treytirnar um tíðarskeið, títtleika og um ikki at taða oftari enn triðja hvørt ár á sama stað eru settar sambært ávísing frá Búnaðarstovuni. Tí heldur Umhvørvisstovan fast við hesar treytir. Tíðarskeiðið, har loyvt er at taða, er tó longt til 31. august.

## 3. Treytir

Loyvið verður veitt við hesum treytum:

3.1 Taðast skal bara á økinum, sum er víst í fylgiskjalinum.
3.2 Taðast kann frá 15. mai til 31. august.
3.3 Nøgdin av tøðum skal í mesta lagi vera 200 kg av N (sum samsvara við 50 $m^3$ av flottøðum) fyri hvønn hektar um árið.
3.4 Taðast skal við í mesta lagi 100 kg av N (sum samsvara við 25 $m^3$ av flottøðum) pr. hektar hvørja ferð við einum millumbili upp á í minsta lagi 8 vikur.
3.5 Tøð mugu ikki sprænast sama stað í haganum oftari enn triðja hvørt ár.
3.6 Ansast skal eftir, at ásetingarnar í kunngerðini um taðing verða yvirhildnar, serliga
- at tøðini ikki seta út í áir, løkir og tjarnir,
- at taðast ikki skal í regni ella frosti,
- at ansað verður eftir, at tøð í minst møguligan mun verða sprænd á hagagrót.

3.7 Umhvørvisstovan skal hava fráboðan, áðrenn taðað verður.
3.8 Taðast skal ikki nærri enn 50 metrar frá granskingarøkjum, hjá Søvnum landsins.
3.9 Í seinasta lagi 1. november á hvørjum ári skal loyvishavarin senda Umhvørvisstovuni frágreiðing um taðing í árinum, t.e. hvussu nógv og nær er taðað, og á hvørjum økjum.
3.10 Tá royndartíðarskeiðið er úti, t.e. aftan á 31. august 2018, verður loyvið eftirmett av Umhvørvisstovuni saman við loyvishavaranum.

## 4. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann kærast til Heilsu- og innlendismálaráðið. Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, avgerðin er fráboðað. Kærur skulu sendast til Umhvørvisstovuna, sum sendir kæruna til Heilsu- og innlendismálaráðið saman við tilfarinum, sum hevur ligið til grund fyri málsviðgerðini.

Kærur skulu vera Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi 12. mai 2016.

Suni Petersen, deildarleiðari

Heidi Mortensen, umhvørvisviðgeri

Avrit sent til

Tórshavnar kommunu
Landslæknan
Búnaðarstovuna

umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo

Fylgiskjal

Økið, har undantaksloyvi til at taða er veitt.



umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo